Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Ábyrgd av serskúlaflutningi

Spurningar:

1. Kann landsstýrismaðurin greiða frá, hvørjar flutningstænastur kommunustýrið skal seta í verk fyri at lúka kravið í serskúlalógini um at bera kostnaðin av næmingaflutninginum?

2. Hvør myndugleiki skal ávikavist skipa fyri og gjalda fyri næmingaflutning í teimum førum, har næmingurin hevur so serligan tørv, at næmingurin ikki kann ferðast saman við øðrum, t.d. við Bygdaleiðum ella aðrari busstænastu?

3. Ætlar landsstýrismaðurin at taka stig til eina meira samhaldsfasta flutningstænastu, har landið átekur sær næmingaflutningin á serskúlaøkinum?

Viðmerkingar:
Serskúlalógin (ll. nr. 50 frá 9. mai 2005 um serskúla, sum broytt við løgtingslóg nr. 47 frá 6. mai 2016) ásetir í § 11, stk. 3, at kommunustýrið skal bera kostnaðin av næmingaflutninginum í og úr skúla. Hetta skal sum skilst gerast eftir somu reglum sum eftir fólkaskúlalógini.

Eftir § 33 í fólkaskúlalógini er yvirskipaða kravið, at kommunustýrið skal skipa fyri flutningi millum skúlar og heim ella nánd av heiminum av næmingum, sum ganga í skúla uttan fyri teirra egnu bústaðarkommunu. Lógin ásetir eisini, at hendan flutningsskyldan kann vera lokin við at vísa næmingunum til almennar ferðslumiðlar ella við at samsýna teimum útreiðslur til egnan flutning.

Spyrjarin hevur fingið kunnleika til, at hendan skipan kann vera sera óheppin í einstøkum førum. Dømi eru um, at ein miðalstór kommuna má hava upp í tríggjar einstaklingafyriskipanir um næmingaflutning. Orsøkin er tann einfalda, at næmingarnir hvør í sínum lagi hava so mikið serligan tørv, at teir ikki kunnu ferðast saman við øðrum.

Tað er sjálvandi sera óheppið, um kommunur kenna seg noyddar at skipa fyri slíkum næmingaflutningi, ið at síggja til liggur væl uttanfyri ta ábyrgd, sum fólkaskúlalógin áleggur kommununum; men tað verður gjørt, tí eftir øllum at døma er ongin annar sum tekur um endan, tá ið tey nærmastu ikki hava umstøður ella møguleika at átaka sær flutningin.

Spurningurin er, um tað skal vera uppgávan hjá einari kommunu – og ikki ein landsuppgáva - at hava einstaklingafyriskipanir, tá ið tað kemur til næmingaflutning. Spurt verður tí um, hvussu lóggávan skal skiljast á hesum øki og hvørjar ætlanir landsstýrismaðurin hevur.

Á Løgtingi, 14. september 2022

Jóhannis Joensen